tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Tilfeingið er okkara

## *Oddagrein*

Á bygdum í Føroyum eru ikki altíð so nógvir møguleikar at koma á arbeiðsmarknaðin, kanska serliga hjá kvinnum. Skal nakar hugsingur um útjaðaramenning vera, so má tryggjast, at arbeiðspláss í fiskivinnuni verða varðveitt á landi og ikki flyta framleiðsluna umborð á skipini, so sum eitt nú Fiskimannafelagið mælir til. Trupulleikin í fiskivinnnuni er millum annað ein yvirkapacitetur. Verður framleiðslan frá fiski á landgrunninum flutt umborð á skipini, so fer at standa heilt illa til á teimum plássum, ið serliga eru knýtt at fiskaframleiðslu á landi — eitt nú Suðuroyggin.

Tað er ein ikki sørt framligur hugburður, ið liggur aftan fyri boðskapin um at royna at fáa framleiðslu umborð á skipini, ið royna á landgrunninum. Hevði tað verið soleiðis, at tilfeingið var ogn hjá teimum reiðarum, ið høvdu fiskiloyvi á landgrunninum, so hevði skil verið í tankangongdini, men tað er nú einaferð ikki soleiðis. Tilfeingið er ogn Føroya fólks, og tí er tað heilt náttúrligt, at hettar tilfeingið er við til at skapa arbeiðspláss á landi. Vit hava sagt tað fyrr her í blaðnum, at um núverandi loyvishavarar ikki megna uppgávuna, so mugu aðrir sleppa framat. At summir í serligum førum framleiða umborð, har talan er um serliga framleiðslu, er sjálvsagt ikki tað, vit her finnast at. Tað kann ikki vera ein spurningur um antin ella men um bæði og.

Valið er ímillum at hava eitt fiskiveiðusamfelag ella at hava eitt fiskiídnaðarsamfelag. Tað fyrra hava vit roynt, og eru mangan komin út á djúpt vatn - ein hóskandi metaforur - vegna stuttskygni í vinnuni og hjá myndugelikunum. Eitt fiskiídnaðarsamfelag er eitt samfelag, har man hevur eitt vælvirkandi framleiðslulið á landi, og megnar at fáa eina javnari gongd í búskapinum, samstundis sum útjaðaranum verður lív lagað ígjøgnum møguleikar at framleiða fiskavørur á landi.

Verður tað, sum Fiskimannafelagið skjýtur upp, og skal tað takast bókstaviligt, so er deyðin í durinum hjá føroyska útjaðaranum. Eitt føroyskt húsarhald í dag má helst hava tvær inntøkur at forrenta hús og annað við. Hvørjir møguleikar hava eitt nú ófaglærd í útjaðaranum, um fiskivinna á landi verður avskaffað? Er tað moralskt rætt, at teir, ið frá øllum Føroya fólki hava fingið rætt til at royna á landgrunninum, fara at framleiða alt umborð?

Hettar mál er eitt álvarsmál, og tað er skilligt, at Fiskimannafelagið nevnir trupulleikan við rentabiliteti í vinnuni, hóast tað eru ymsar meiningar um loysnina á hesum. Vónandi verður hettar eitt mál, ið nógv fer at vera tosað um í komandi ári. Tað skal vera okkara vón fyri tað nýggja árið, at myndugleikar, vinnulív og fakfeløg bæði a landi og sjógvi tosa um hesi ting og semjast um eina skilagóða loysn, ið tryggjar arbeiðspláss á sjógvi og landi. Útjaðaramenning verður ikki lív lagað, um ikki arbeiðstilboð eru til taks - eisini innan fiskivinnu á landi.

*Sosialurin*

Viðmerking

# Sanna søgan um pensjónirnar sum gjørdust jólatrøll



Goragangurin frá framstandandi sjálvstýrismanni um handfaring Tjóðveldisfloksins av nýggju pensjónslógini noyðir meg á vøllin við sonnu søguni um pensjónirnar sum gjørdust jólatrøll.

**Gíslatøka Tjóðveldisfloksins**

Varð ikki sørt kløkkur tá eg í gjár sá yvirskriftina um gíslatøkuna hjá Tjóðveldisflokkinum. Sjálvandi varð eg nakað argur at byrja við, tí bæði undirritaði og Finnur Helmsdal, vórðu lýstir á ein hátt ið eg sjálvur ikki kenni aftur frá okkara trúfasta samgongusamstarvi. Og slettis ikki í samstarvinum við landsstýrismanninum Helenu Dam á Neystabø, ið allaroftast varir at teimum málum ið enda í trivnaðarnevndini. Haldið sjálvur at vit hava verið sera trúgvir samgongustuðlar, eisini tá tað hevur snúð seg um at bera til garðs uppskot frá Helenu Dam á Neystabø, sum vóru merkt av væntandi fyrireiking og tíðarneyð.

**Búktalarin og dukkan**

Allir búktalarar hava sína dukku. Gjøgnum dukkuna fær búktalarin møguleika at siga tað hann ella hon hevur uppá hjarta, ofta tað freka ella ikki loyvda, á ein óbeinleiðis hátt sum onkusvegna tryggjar at avleiðingarnar av tí sagda ikki gerast ov stórar. Og hevur dukkan eina stuttliga útsjónd, ja, so gerst ikki verri at svølgja sjálvt teimum ljótastu orðunum. Ongin ivi er um at Jan A. Joensen er dukkan sum sigur ljótu orðini í Sosialinum mikudagin 29. des. Stuttlig eru tey als ikki, neyvan heldur fyri greinskrivaran sjálvan tá hann varnast leikin, hann er vorðin dukka í. Ikki er tað heldur so torført at gita hvør búktalarin er.

**Sanna søgan**

Mest av øllum harmar tað meg at ein samgongufelagi ikki gevur mær annan møguleika, enn at siga sonnu søguna um pensjónirnar sum gjørdust jólatrøll. Neyvan til gagns fyri pensionistin og samgonguna, og als ikki Sjálvstýrisflokkinum at bata heldur.

Sanna søgan um nýggju pensjónslógirnar er ikki longri enn so at hon kann sigast í lutfalsliga fáum orðum.

Á vári 1999 leggur Helena Dam á Neystabø fram, fyrra part av uppskotinum um nýggju pensjónslógirnar. Uppskotið lýsir í høvuðsheitum hvørjar pensjónsmøguleikar almennu Føroyar bjóða okkara pensionistum. Uppskotið verður av trúfasta meirilutanum í trivnaðarnevndini trumlað ígjøgnum í skundi. Ein gerð sum eg javnan iðri meg um, ikki minst tá ein sær hvussu tøkkir kunnu skrivast nú á døgum. Álitið frá meirilutanum sigur ikki nógv, men kemur tó við eini áheitan á Helenu Dam á Neystabø um at leggja fyri tingið, í seinasta lagi beint eftir Ólavsøku, hin partin av pensjónsløggávuni. Nógv umrøddu ásetingarlóggávuna sum ásetir hvussu nógv ymsu pensionistabólkarnir skulu hava í sín lut. Á henda hátt royndi trúfasti meirilutin at fyribyrgja tí sum júst er hent endanum av eldraárinum, at pensjónirnar gjørdust jólatrøll.

Helena Dam á Neystabø lurtaði ikki eftir meirilutanum í Trivnaðarnevndini. Ásetingarlógin varð ikki løgd fyri tingið beint eftir Ólavsøku, men er sambært uppskotinum farið úr hondunum á Helenu Dam á Neystabø tann 29. nov. 1999.

Trivnaðarnevndin hevur fyrsta fundin um málið tann 7. des. 1999, og hevur innan tann fundin biðið um upplýsandi tilfar frá Almanna og heilsumálastýrinum. Nevndin ger av at kalla landsstýrismannin á fund tann 14. des. at greiða nevndini frá ymsum viðurskiftum í ásetingarlóggávuni. Týdningarmesti spurningurin snýr seg um hvat ið er eftir aftaná skatt hjá ymsu pensionistabólkunum. Svarið frá Helenu Dam á Neystabø, er at hon hevur spurt Toll og Skatt um sama spurning, men hevur enn ikki fingið svarið. Eitt svar ið seinni vísti seg at vera hinumegin sannleikan. Toll og Skatt hevði ikki fingið fyrispurningin.

16. des. 1999, seinnapartin, fær Karsten Hansen, landsstýrismaður boð um at gera neyðugu útrokningarnar viðvíkjandi nettotølunum sambært nýggju ásetingarlóggávuni.

Tíðliga morgunin eftir eru tølini klár frá einum skjótt og vælvirkandi fíggjarmálastýri. Sjálvur seti eg meg at rokna út hvør munurin er á gomlu nettotølunum, og nettotølunum sambært nýggju ásetingarlóggávuni. Skelkaður av nógva skattinum sum legst á upphæddirnar, seti eg meg í samband við eina enn meiri skelkaða Helenu Dam á Neystabø, tá hon hoyrir hvussu upprunaligu pensjónsupphæddirnar eru etnar upp í skatti. Hon kendi ikki til nettotølini eftir skatt, og tað merkir í veruleikanum at hon ikki kendi til hvørjar fíggjarligar avleiðingar nýggja ásetingarlógin fekk fyri pensionistin. Hesar sera týdningarmiklu upplýsingar vildi trivnaðarnevndin tryggja sær kunnleika um, áðrenn ásetingarlógin skuldi samtykkjast við aðru og triðju viðgerð í tinginum.

**Skattalættin**

Seinni sama dag tryggjaði samgongumeirilutin í trivnaðarnevndini sær, at samgongan leggur fram skattalættauppskot, sum viðførir at meira verður eftir av pensjónshækkingunum, enn ásetingarlóggávan megnar. Hesin skattalætti skal virka frá 1/1-2000, og verður væntandi samtyktur fyrst í nýggja árinum við afturvirkandi megi.

Sjálvur skrivi eg útkast til álit í vikuskiftinum og mánamorgunin 20. des. verður endaligt álit skriva viðvíkjandi nýggju pensjónsásetingarlóggávuni.

Hóast løgtingsformaðurin og flokksformenninir vístu stóra vælvild og góvu loyvi til frávik í tingskipanini, so onnur og triðja viðgerð av málinum kundu verða sama tingdagin tann 22. des., so varð ov seint til pensjónirnar kundu gjaldast út undan jólum.

**Hvør eigur blæðuna?**

Tá smábørn hava kukkað í blæðuna og rami roykurin breiðir seg, plaga tey at siga »itti eg«, og eg góðtaki píniligu verjustøðuna, men av einum vaksnum fólki vænti eg mær eitt sindur meira Jan A. Joensen.

Illa luktandi blæðan er í hesum førinum fylt av Sjálvstýrisflokkinum, meðan allir trivnaðarnevndarlimirnir ídnir hava gjørt sítt til at vaska blæðuna reina aftur, tað avgjørt seinasta upptakið eftir landsstýrismannin Helenu Dam á Neystabø fyri mítt viðkomandi.

Tí uttan at himprast kundi eg nevnt upp í rúgvur av málum frá sama landsstýrismanni, sum bera á sama borðið sum nýggja ásetingarlógin.

Allir flokkar og alt Føroya fólk kann gleðast um at fíggjarstøðan í Føroyum er so fræg at vit fáa bøtt um kor okkara ringast staddu pensionista. At sitandi samgonga sum tann fyrsta í mong ár hevur bøtt um viðurskiftini hjá pensionistunum er ein veruleiki sum allir samgonguflokkar kunnu gleðast um.

Annars kunnu vit eisini gleðast um at pensionistar okkara fingu pensiónina áðrenn at eldraárið var at enda komið. Tá hevði skommin verið fullkomin.

Við vón um betri stev í nýggja árinum.

Gott nýggjár øll somul.

Vinarliga
**Páll á Reynatúgvu,**
**Tjóðveldisflokkurin**

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**





# Hol sett á túsundárahaldið

*Nýggjársdag skipaði Føroya bispur fyri hátíðarguðstænastu í dómkirkjuni við luttøku frá ymiskum kristnum trúarbólkum í sambandi við, at tað eru túsund ár síðani Føroyar vórðu kristnaðar*

John Johannessen

Samanhald merkti hátíðarguðstænastuna í dómkirkjuni nýggjársdag. Talan var um eina guðstænastu, ið skuldi seta hol á túsundárið fyri kristniboðan Føroya. Hetta varð gjørt við at halda eina guðstænastu, har allir kristnir trúarbólkar í Føroyum vóru bodnir at luttaka. Tískil var guðstænastan merkt av samanhaldinum í kristindóminum og ikki sundurlyndinum, ið viðhvørt tekur seg upp millum túarbólkar.

Undir guðstænastuni lósu umboð fyri nakrar av trúarbólkunum upp dagsins tekst og annan tekst, ið hevði samband við guðstænastuna. Talan var um umboð frá Adventistakirkjuni, katólsku kirkjuni í Havn, Frelsunarherinum og Hvítusunnusamkomunum. Fyri prædikuni stóð Føroya bispur, Hans Jacob Joensen.

**Tað fyrsta av mongum**

Tiltakið í dómkirkjuni nýggjársdag var tað fyrsta av mongum tiltøkum í sambandi við fagnaðarárið fyri krisniboðan Føroya.

Føroya Dómpróstur, Bjarni Bæk, sum eisini var til fagnaðarguðstænastuna, sigur fyri Sosialinum, at guðstænastan var fyrireikað av einum bólki, mannaðum við umboðum úr ymisku trúarbólkunum, ið luttóku í guðstænastuni. Hesin bólkur er nevniliga settur at fyrireika og samskipa tey tiltøk, ið verða hildin í sambandi við túsund ára haldið, og helt bólkurin tað vera hóskandi, at fagnaðárið varð sett við einari guðstænastu í dómkirkjuni.

Seinni verða tiltøk hildin í ymisku samkomunum, og høvðustiltakið verður sjálv hátíðarguðstænastan hvítusunnudag, har drotningin verður hjástødd.

**Undirstrikaðu samanhaldið**

Bjarni Bæk, dómpróstur, heldur, at guðstænastan nýggjársdag, samstundis sum hon var innsetanin av fagnaðarárinum fyri kristniboðan Føroya, eisini var ein undirstrikan av, at ymsiku kristnu trúarbólkarnir góðkenna og virða hvønn annan, hóast teir ikki hava júst somu uppfatan av kristindóminum.

– Trúarbólkarnir sýndu nýggjársdag alment, at teir standa saman um felagsskapin, vit hava í kristindóminum, hóast hetta ikki merkir, at ymsiku bólkarnir fara at broyta arbeiðsháttin innan júst teirra samkomu av hesum tiltakinum.

Bjarni Bæk leggur afturat, at hann heldur, at tiltakið eydnaðist væl, og sigur hann seg hava frætt frá fólki, at tey upplivdu tiltakið, sum nakað positivt.

# Rás 2 hevur sett átta fólk

Eirikur Lindenskov

Rás 2, nýggja útvarpsstøðin í Havn, hevur nú rættuliga brynjað seg til framleiðslu av sendingum, og fyrsta dagin kemur støðin við sendiskrá, ið verður útbygd sum frálíður.

Støðin hevur sett átta fólk í føst størv, og sum frálíður verða fleiri freelancefólk sett.

Manningin á støðini er nú hendan:

Suni Jacobsen, fyritaksstjóri
Petur Jacobsen, tøknileiðari
Jan P. Jacobsen, vevstjóri
Ó. J. Rólantsson, programleiðari
Sonne Smith, tíðindaleiðari
Laila Jacobsen, tónleikaleiðari
Ronnie petursson, tøkningur
Ronnie Poulsen, tøkningur

# »Koyribreytin« tikin av skránni



*Nú Óla Jákup Rólantsson er vorðin programleiðari hjá Rás 2, er Koyribreytin tikin av skránni hjá ÚF*

Eirikur Lindenskov

Tað merkist hjá Útvarpi Føroya, at kappingarneytin nú brynjar. Fyrsta avleiðingin er, at vælumtókta sendingin, Koyribreytin, sum tey bæði Óla Jákup Rólantsson og Laila Jacobsen hava staðið fyri, nú er tikin av skránni.

Óla Jákup Rólantsson er settur sum programleiðari hjá nýggju útvarpsrásini, meðan Laila Jacobsen er sett sum tónleikaleiðari.

Tað eydnaðist Sosialinum hvørki at fáa fatur á Jógvani Jespersen, útvarpsstjóra ella Jógvani Arge, programleiðara, áðrenn blaðið fór til prentingar. Í seinastu sendingin fyri jól boðaði Óla Jákup Rólantsson frá, at framtíðin hjá Koyribreytini var ivasom.

Á heimasíðu útvarpsins verður upplýst, at Koyribreytin er tikin av skránni.

# Komu væl gjøgnum ársskiftið

*Úti í heimi eins og í Føroyum fór skiftið frá 1999 til 2000 fram uttan stórvegis trupulleikar*

John Johannessen

Hóast mongu stúranirnar kring heimin um, hvussu ártúsundskiftið fór at ávirka elektróniska útgerð kring allan heimin, spældi alt væl av kortini. Dómadagsprædikurnar hildu ikki. Talan var bert um smávegis trupulleikar.

Danska blaðið Jyllandsposten hevur fylgt við, hvussu ár 2000 trupulleikin hevur gjørt um seg kring heimin. Blaðið veit úr Týsklandi at siga frá, at eitt felag hjá nøkrum týskum tíðindafólkum brádliga fekk næstan 4 milliónir týskar markar inn á konto sína. Ein annar kundi í einum banka fekk 13 milliónir markar inn á konto sína. Hildið verður í báðum førum, at talan er um ár 2000 trupulleikar.

Í Svøríki fingu trý sjúkrahús trupulleikar við sokallaðu ekg-maskinunum, ið verða nýttar til at halda eygað við hjartarútmuni hjá sjúklingum. Maskinurnar vístu ár 1900 í staðin fyri ár 2000 í ein hálvan tíma, áðrenn fólk uppdagaðu, hvat var galið.

Í Onglandi brutu 10.000 gjaldskortterminalar saman teir fýra dagarnar frammanundan ártúsundskiftinum. Ein central telda, ið júst goymir upplýsingar í fýra dagar, kláraði ikki ár 2000, og tí máttu fleiri túsund handlar heita á kundar sínar um at gjalda kontant ella avgreiða kortgjaldið manuelt.

Í Italia sendi telefyritøkan, Telecom Italia, rokningar út fyri fyrstu tveir mánaðirnar ár 1900.

Í Spania máttu starvsfólkini á einum elverki stýra streymveitingini manuelt, tá teldan, ið skuldi rokna styrkina til streymveitingina út, breyt saman. Harafturat sluppu starvsfólk á einum atomverki í Spania ikki framat einum trygdarøki, orsakað av ár 2000 trupulleikum.

Í Japan fór útgerðin til at mála geislanina á einum kjarnorkuverki, men hetta ávirkaði sambært umboðsfólkum hjá verkinum ikki trygdina. Afturat hesum fingu tólv japonsk meglaravirki trupulleikar, tá virki nýttu allan sunnudagin at royndarkoyra teldukervið í sambandið við japanska gjaldoyramarknaðin. Eisini fór ein skipan, ið savnar upplýsingar til smá flogfør.

Í Suður-Korea máttu 900 íbúðir í høvuðsstaðnum trína inn í ár 2000 uttan hita. Hitaskipanin breyt saman og hitin hvarv. Teldur á einum sjúkrahúsið í Suður-Korea skrásettu tað fyrst fødda barnið ár 2000 til at vera 100 ára gamalt.

Í Australia hava tveir statir fingið trupulleikar við bussferðaseðlaskipanum.

Í Kanada sýntust lyklarnir til trygdarrúmið hjá verjumáláraráðnum ikki at vera ár 2000 tryggir.

Í USA komu boð frá sjey atomorkuverkum um trupulleikar, men trupulleikarnir ávirkaðu hvørki streymveitingina ella trygdina. Ein reaktorur hevði trupulleikar við skipanunum, ið halda eygað við rørðslu inn og út frá stáluøkjum, men villan varð beinanvegin rættað. Ein annar reaktorur fekk eisini smávegis trpulleikar, men eisini hetta brekið varð beinanvegin rættað.

150 spælimaskinur við eina ríðibreyt gingu fyri, men kundu beinan vegin gerast aftur.

US Naval Observatory, ið hevur almennu skylduna at rokna støðuna hjá jørðini og hinum gongustjørnunum, segði beint eftir midnátt árið at vera ár 19.000.

Annars frættist ikki um stórvegis ár 2000 trupulleikar, hvørki í Føroyum ella úti í heimi.